# Tíðindaskriv frá Føroya Ungdómsráð

## FUR heiðursløning til eldsálir í barna- og ungdómsarbeiði

Á landsfundinum hjá FUR 25. mars 2023 handaði Rói B. Poulsen, formaður í FUR, Fíu Lindenskov, Gunnvør Joensen, Hilmari Joensen og Esbern á Geilini FUR heiðursløning 2023.



Rói B. Poulsen, formaður í FUR, Esbern á Geilini, Fía Lindenskov, Gunnvør Joensen og Hilmar Joensen

### Grundgeving fyri at lata Fíu Lindenskov FUR heiðursløning

Fía Lindenskov hevur fingið FUR heiðursløning fyri við sínum blíða lyndi og góða hugburði til skótalívið at hava verið virkin í KFUK skótunum frá heilt ungum aldri.
Fía hevur fingið fleiri nýggj skótalið í Havn og nýggjar leiðarar soleiðis, at KFUK skótar er nógv vaksið seinnu árini. Fía er virkin í skótavirksemi bæði í Føroyum og uttanlands.
Felagsskapurin er grundfestur í arbeiðsháttunum hjá Fíu, sum nú er forkvinna í Føroya KFUK skótum, bólkaleiðari og liðleiðari hjá Havnar KFUK skótum.



Fía Lindenskov

### Grundgeving fyri at lata Gunnvør Joensen og Hilmar Joensen FUR

Gunnvør Joensen og Hilmar Joensen hava fingið FUR heiðursløning fyri í eitt mannaminni á serstakan og viðurkennandi hátt at hava lagt lunnar undir og ment sjónleika- og tónleikavirksemi í Nólsoy. Gunnvør og Hilmar síggja týdningin í at stuðla og menna skapanarevnini, sum tey ungu eiga.

Gunnvør og Hilmar duga at fáa tey ungu at kenna seg væl, tey síggja dygdirnar hjá tí einstaka og eru viðurkennandi á slíkan hátt, at tann ungi torir og lærir at menna egna styrki og førleikar

### Grundgeving fyri at lata Esbern á Geilini FUR heiðursløning

Esbern á Geilini hevur fingið FUR heiðursløning fyri at hava verið við til at byggja upp Tabletop Føroyar, sum hevur til endamáls at økja áhugan fyri og trivnaðin við borðspælmentanini í Føroyum.



Esbern á Geilini

Felagið hevur høli at húsast í, hevur stórt úrval av borðspølum og skipar fyri alsamt fleiri borðspæltiltøkum kring landið.

Esbern hevur við sínum áræði, hugskotum og síni medferð megnað at fáa ungdómin í felagnum Tabletop Føroyar at vera partur av væl skipaðum og mennandi ungdómslívi, har øll eru vælkomin og kenna seg væl.